gult32 cyan32 magenta32 svart32



Blái Krossur Føroya søkir

# Fyristøðufólk til Blákrossheimið

Av tí at fyristøðufólk okkara á Blákrossheiminum fer úr starvi 15. juli 2001, søkja vit eftir nýggjum fyristøðufólki at byrja 1. juli 2001 ella so skjótt sum til ber.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- Dagligu leiðsluna av Blákrossheiminum, herundir eisini tí fíggjarliga
- At tryggja búfólkunum góð og livilig kor
- At menna starvsfólkini
- At samstarva við stýrið fyri heimið og annað virksemi í Bláa Krossi
- At samstarva við aðrar stovnar og almennar myndugleikar

**Førleikakrøv:**
- Hóskandi fakliga útbúgving og leiðsluroyndir
- Kunnleika til málbólkin
- Góð samstarvsevni og hegni at skipa fyri og leiða arbeiðið
- Góð evni at býta út uppgávur og at stimbra starvsfólkunum
- Kann, í samstarvi við starvfólkini, menna heimið fakliga
- Góð evni at lurta
- Tekur undir við tí sum Blái Krossur stendur fyri, hugsjónarliga og andaliga

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og gevandi arbeiðsumhvørvi og ágrýtin starvsfólk
- Persónliga menning gjøgnum skeiðluttøku
- Samband og samstarv við onnur starvsfólk í landsfelagsskapinum
- Eitt leiðarastarv lønt sambært avtalu millum Blákrossheimið og Fíggjarmálastýrið

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Bláa Krossi Føroya í hendi í seinasta lagi 18. juni 2001.

Umsóknir skulu sendast til:
**Bláa Kross Føroya**
att. Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivari
Glyvravegur, 625-Glyvrar.

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja til skrivstovuna hjá Bláa Krossi tlf. 449343 og tosa við Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivara.

Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri. Á heiminum eru 11,5 starvsfólk. Pláss er fyri 15 búfólkum. Eisini eru búfelagsskapir og eftirviðgerð knýtt at heiminum. Blákrossheimið verður fíggjað við árligari játtan frá landsstýrinum.

Blái Krossur Føroya er ein kristiligur fráhalds- og hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

**Blái Krossur Føroya**
Glyvravegur, 625 Glyvrar
tlf. 449343, fax: 449353
t-postur: blakross@blakross.fo
www.blakross.fo

# Skráin fyri stevnuna á Strondum

**Hósdagin 24. mai**
kl. 18 Stevnubingo

**Fríggjadagin 25. mai**
kl. 18.30 Sjavskapping

**Leygardagin 26. mai**
kl. 16 Kular Røtur og øll Trøllafamiljan í høllini á Skála
kl. 18 Matstovan letur upp í Bygdarhúsinum
kl. 18 Tivoli – Hoppiborgin og hamarslag við Bygdarhúsið
kl. 19 Rulliskoytukapping (ókeypis)
kl. 19.30 Barnadiskotek (ókeypis)
kl. 20 Vísusangur við »Vísumonnum«
kl. 22 Syngið við
kl. 23.30 Dansur við »Moonshot«

**Sunnudagin 27. mai**
kl. 11 Gudstænasta í Sjóvar kirkju v/ Jógvan Fríðriksson
kl. 14.30 Tivoli og matsøla lata upp við bátahylin
kl. 15 Kappróður (róð verður 1000 m og 1500 m)
kl. 17.30 Skemtidystur millum konur av Strondum (ókeypis)
kl. 18 Togtogan millum strandingar og skálamenn (ókeypis)
kl. 18 Matstovan letur upp í Bygdarhúsinum
kl. 18 Tivoli – Hoppiborgin og hamarkast við Bygdarhúsið
kl. 18.30 Vørutombola
kl. 19 Eydnuhjól
kl. 19 Barnadiskotek (ókeypis)
kl. 21 Útimøti (Keldan)

Føroya størsta úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir
Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Íblandingarevni
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari
...sjálvandi til besta prísin!!
FARPACK
Staravegur 5, P.O. Box 3099
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

# Klinikkassistentur

Vit søkja eftir einum klinikkassistenti at byrja 01. juni ella eftir nærri avtalu.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Tannlæknastovuna í Brekkugøtu 8, 100 Tórshavn, og má vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 29. mai 2001.

**Tannlæknastovan í Brekkugøtu**
Tlf. 315158
v/ Marner Gaard,
Ísak Thomassen og
Regin Eikhólm
tannlæknar

Søkt verður eftir

# Kokkum og hjálparfólkum

til fast starv í nýggjum pizzaria í Tórshavn. Royndir eru ein fyrimunur, men eru tó ikki krav.

Nærri fæst at vita við at venda sær til

**Pizzakjallaran**
á tlf. 215858.

# Bilførari

Søkt verður eftir bilførara við stóra koyrikortinum til fast arbeiði at byrja beinanvegin.

Fyrimunur við royndum, tó eingin treyt.

**ABS Transport**
Gæsugøta 5 - 100 Tórshavn
Tlf. 311200 ella mobil 219090,
spyr eftir Olav

# Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 12. og 13. juni 2001 og á **Landssjúkrahúsinum** 14. juni 2001.

Tíð fæst við at ringja á **tlf. 45 54 63**, týsdag og mikudag kl. 10-12, í seinasta lagi mikudagin 6. juni.



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrasystrar, pleygarar og sosial- og heilsuatstøðingar til psykiatriska røktarøkið

Á D3 eru 4 føst størv leys at søkja. Øll størvini verða sett pr. 16. juli 2001. Talan er um:

- eina sjúkrasystir á starvsbrøki 1,0
- tvær sjúkrasystrar á starvsbrøki 0,7
- ein pleygari ella almanna- og heilsuatstøðingur á starvsbrøki 1,0.

Deildin er ein stutt- og langtíðar psykiatrisk deild, har arbeitt verður eftir miljøterapeutiskum meginreglum og kontaktpersónsskipanini. Arbeitt verður fram móti at geva sjúklingunum økt sjálvbjargni og við tíðini møguleikan at flyta í egna íbúð. Deildin er í støðugari menning. Har starvast sjúkrasystrar, pleygarar og sosial- og heilsuatstøðingar í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar.

Vit vænta, at tú hevur góð samstarvsevni og hevur áhuga at arbeiða við psykiatri. Vit ynskja at tú saman við okkum kann verða við til at skapa eitt gott umhvørvi fyri sjúklingar og starvsfólk, og at tú ert nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir til størvini smb. sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Fyrispurningar:**
Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til virkandi deildarsjúkrasystrina á D3, Ásla Joensen, tlf. 313540, lokal 423 ella til Bergit Weihe, yvirsjúkrasystir, lokal 351.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreist: **7. juni 2001 kl. 12.00**

# Skúlastýrisval

Valevnalisti – skúlastýrivalið til Skúlan á Ziskatrøð mánadagin hin 28. mai 2001 – kl. 14.00-20.00. Valstaður: Fimleikarhøll 2.

| Valevni | Bústaður |
|---|---|
| Olga Biskopstø | Garðavegur 4 |
| Ella Heinesen | Vágsheygsgøta |
| Niclas Heri Jákupsson | Kósaskákið 4 |
| Kristianna Johannesen | Stangavegur 150 |
| Sigurd Syderbø | Stangavegur 62 |
| Súsanna Thomassen | Heygavegur |
| Ásvald Thomsen | 740 Hvannasund |
| Sigrun Vágstún | Nólsoyar Pálsgøta 38 |

Klaksvík 22. mai 2001
**Valnevndin**

# Skúlastýrisval Fuglafjarðar skúli

Til skúlastýrisvalið eru hesi valevni:

Poulina Abrahamsen, Fuglafjørður
Lillian Johannesen, Fuglafjørður
Kristina Larsen, Fuglafjørður
Sonja á Líðarenda, Norðragøta
Uni Næs, Fuglafjørður
Unn E. Petersen, Fuglafjørður

Atkvøðugreiðslan til skúlastýrið verður í stovu 209 í skúlanum **mánadagin 28. mai frá kl. 14.00 til kl. 20.00.**

Veljarar, sum ikki kunnu møta valdagin, kunnu venda sær til skúlastjóran og atkvøða við brævatkvøðu í seinasta lagi kl. 18.00 dagin fyri valdagin.

**Valnevndin f. Fuglafjarðar skúla**

# Kunngerð um val av skúlastýri til Stranda skúla 2001

Val av foreldraumboðum til skúlastýrið í Stranda skúla verður mánadagin 28. mai frá kl. 14 til 20 í Stranda skúla.

Valevnini eru hesi:
Etly Berthelsen, Strendur
Kathrina G. Joensen, Strendur
Carolina H. Johansen, Strendur
Súni Kristiansen, Skála
Jóhan Petur Olsen, Strendur
Bergljott Jarnskor Poulsen, Strendur

**Valnevndin**

RIO BRAVO RESTAURANT

Til nýggja staðið hjá okkum, verður søkt eftir fólki skjótast gjørligt at gera vanligar døgurðar.

Løn eftir nærri avtalu.

Áhugað verða biðin um at ringja til

**Rio Bravo**
Tlf. 219696 ella 319696

# Málaralærlingur

søkist.

**Henning Sørensen**
Tlf. 314783

**Almanna- og Heilsumálastýrð**

# Skrivari til Trivnaðar- og heilsuráð

Føroya Løgting hevur viðtikið at setast skal á stovn eitt trivnaðar- og heilsuráð undir landsstýrismanninum í Almanna- og heilsumálum.
Trivnaðar- og heilsuráðið hevur til uppgávu at útgreina føroyska almanna- og heilsuverkið og gera uppskot til eina langtíðarætlan fyri føroysku vælferðartænastuna.
Til hetta ráð er avgjørt at setast skal skrivari við hægri útbúgving at starvast fulla tíð.

Tí verður við hesum starvið sum skrivari lýst leyst til setan sum skjótast og tíðaravmarkað til 31. desember 2001.

**Starvið inniber:**
- at vera við til at skipa trivnaðar- og heilsuráðið
- at vera skrivari hjá ráðnum, harundir
- - at vera við til at gera útgreinaðan arbeiðssetning fyri ráðið
- - at veita ráð og vegleiðing
- - at gera útgreinandi arbeiði
- - viðvirka til at álit verður latið landsstýrismanninum í seinasta lagið 31. desember 2001.

**Krøv til umsøkjaran:**
- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- Royndir, hug og evni til arbeiði við tíðaravmarkaðari arbeiðsuppgávu.
- Kunnleika til Almanna- og heilsuøki
- Royndir við EDV.
- Góð evni at orða seg í skrift og talu
- Góð samstarvsevni.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært avtalu ímillum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mariu á Dul, f.s. aðalstjóra tlf. 35 40 40.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum/viðmælum skal sendast til:
Almanna- og heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 8. juni 2001 kl. 12.00

# Skúlastýrð í Sandvík

Við hesum verður boðað frá, at hesi valevnini eru til skúlastýrisvalið í Sandvík 28. mai, 2001:

Osvald Nielsen, Sandvík
Jenny Olsen, Sandvík
Irena Thomsen, Sandvík
Tummas Thomsen, Sandvík

**Valstýrð**

gult33 cyan33 magenta33 svart33